# 37 mió kr. eftir reyv

**J.F.K. Seafood, sum rekur Næraberg, hevði enn einaferð risa stórt hall í roknskapinum**

NÆRABERG
*Jákup Mørk*

Í tíðindaskrivið boðar Hanus Hansen, stjóri já J.F.K. Seafood frá, at úrslitið sjálvandi ikki er nøktandi fyri felagið.

Enn tykist tað tó, sum hórar fyritøkan undan, tí Norway Seafood við Kjeld Inge Røkke hevur enn einaferð boðað frá, at teir eru sinnaðir at eftirgeva stóran part av millumverandi við felagið. Í 2002 var hendan eftirgevingin góðar 30 mió kr., og skal eginognin retablerast eftir úrslitið í 2003, verður helst neyðugt við eini enn størri skuldareftirgeving hesaferð.

Síðani byrjanina í 2000 hjá Nærabergi hevur trolarin roynt eftir svartkjafti, sum síðani er virkaður til surimi. Raksturin av hesum virkseminum hevur tó verið tungur øll árini, og tó at úrtøkan í framleiðsluni er batnað munandi hesi árini, hava fallandi marknaðarprísirnir fyri surimi drigið samlaða úrslitið niðureftir. Í tíðindaskrivinum verður soleiðis sagt, at framleiðsluúrtøkan í dag er um 20% av rávøruni í mun til tey 12-13%, sum talan var um fyrsta árið.


*Fallandi prísir hava viðført, at betraða framleiðsluúrtøkan ikki hevur givið ítøkiligt úrslit á botnlinjuni hjá J.F.K. Seafood, og aftur í ár verður neyðugt við stórari skuldareftirgeving*

Samlaði umsetningurin hjá Nærabergi var í fjør 79,3 mió kr., og er hetta 5 mió kr. minni enn tað, sum umsett varð fyri í fyrraárið. Leiðslan roknar við, at hækkandi prísir á surimi fara at føra við sær eitt hægri framleiðsluvirði í framtíðini, men samstundis verður tó sagt, at higartil í ár hevur veiðuvirði fyri kilo av rundum fiski verið tað sama, sum tað var í 2003.

Lønarútgjaldingarnar hjá J.F.K. Seafood vóru í 2003 31,5 mió kr., og er hetta eitt vet lægri enn tað, sum varð útgoldið í 2002.

# Týdningarmikið at kunna gagnnýta útlendskan fisk

**PRG Export er eitt av fiskavirkjunum sum umhugsa at gera brúk av møguleikanum at keypa útlendskan fisk og selja hann sum føroyskan, so skjótt Føroyar koma við í avtaluna um pan-europeiska kumulering.**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Stórir fiskaútflytarar sum PRG Export í Gøtu eru ikki í iva tá vit spyrja um ítøkiligar fyrimunir í at kunna keypa útlendskan fisk, tilvirka hann og selja hann sum føroyskan. Nú alt bendir á at føroyingar um stutta tíð gerast partur av tí sokallaðu pan-europeisku skipanini fyri akkumulering, kemur spurningurin um keyp av útlendskum fiski til føroyingar at útflyta uttan um verjutollarnar hjá ES, á dagsskránna hjá nógvum fiskavirkjum sum eitt týðandi mál.

»Um hendan handilsavtalan inniheldur tað sum vit hava skilt at hon inniheldur so kann hetta fáa stóran búskaparligan týdning fyri eitt virki sum okkara,« segði Páll Gregersen, stjóri á PRG Export.

Ofta er trot á rávøru og hetta kostar pening í fleiri liðum. Útlendskur fiskur kann vera eitt svar.

»At kunna planleggja effektivt við so tryggari tilgongd av rávøru sum møguligt, er nakað sum eitt og hvørt fiskavirki sær stóran týdning í; at kunnu keypa fisk frá øðrum og fleiri enn einans føroyingum fer at merkja eitt stórt framstig á hesum øki.«

»Taka vit fiskasløg sum tosk, brosmu, longu, blálongu ella kongafisk, so gera verjutollarnir hjá ES at tað í praksis er ógjørligt at keypa inn hesi fiskasløg úr útlondum fyri at selja tey víðari úr Føroyum. Men koma vit við í skipanina fyri pan-europeiska kumulering, so er støðan ein heilt onnur; tá gerst hetta áhugavert sum møguleiki.«

# Rokna við nýggjum stálbað á Oyri

**Ólønsamt yvirbjóðandi íslendsk og norsk virkir kunnu gera tað torført hjá O. C. Joensen á Oyri at kappast um rávøruna frá rækjuskipum á okkara leiðum**

RÆKJUVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*


*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nú rækjuprísirnir hava verið hækkandi í eina tíð, samstundis sum føroyingar skjótt koma upp í skipanina fyri pan-europeiska kumulering, skuldi ligið væl fyri hjá rækju- og skeljavirkinum O.C. Joensen, Oyri. Men orsakað av at ræjuvirkir í Íslandi og Noreg yvirbjóða hvørt annað meðan mong teirra eftir øllum at døma miðvíst konsolidera seg gjøgnum at fleiri ferðir fara á húsagang, so fer støðan hjá O.C. Joensen neyvan at gerast léttari orsakað av handilsavtaluni, ið eisini gevur íslendingum og norðmonnum sínar fyrimunir í at keypa rækjur frá føroyskum skipum.

Ein røð av faktorum, í høvuðsheitum turbulensur á heimsins rækjumarknað aftur við trupulleikum í tí føroyska rækjuflotanum, hevur noytt O.C. Joensen til at renna skjótari og skjótari fyri at yvirliva. Hóast víðfevnandi rationaliseringar og effektiviseringar framdar bæði í 1998 og í 2000, so er fyritøkan framvegis undir trýsti, og má nú sannlíkt aftur ígjøgnum eitt stálbað.

»Vit hava altíð havt tað sum gylta meginreglu at virkið skal yvirliva og svara hvørjum sítt,« segði Hans Jákup Johansen, ið nýliga varð settur sum stjóri hjá O.C. Joensen.

»Men tað er ikki lætt at kappast um rávøruna við norsk og íslendsk virkir sum bjóða skipunum meira fyri hvørt kilo enn hvat er møguligt at gera vinning burturúr. Vit hava í eina tíð sæð hvussu hesir aktørar ferð aftan á ferð eru farnir á húsagang fyri at fáa skuldir avskrivaðar og síðani fáa aktivini flutt yvir í nýggj feløg…«

*Men prísirnir fyri ta lidnu vøruna hava verið hækkandi í seinastuni?*

»Tíbetur er marknaðurin batnaður og prísirnir komnir nakað uppfrá, men kostnaðarstigið er samstundis hækkað. Skulu vit upp á teir rávøruprísir sum norðmenn og íslendingar í løtuni koyra við, so hava vit ongan møguleika at fáa lønsemi í, hóast vit ídag hava eina fyritøku sum er ógvuliga væl trimmað hvat rationaliteti og effektiviteti viðvíkur; og produkt dygdin er somuleiðis á høgum stigi. Um vit so burturav høvdu havt robottar at gjørt alt arbeiðið, so var tað ómøguligt at fáa tað búskaparliga at hanga saman, um vit skuldu matchað 14 krónur per kilo rávøru, sum vit síggja norðmenn og íslendingar bjóða.«

*Hvat er so at gera?*

»Vit arbeiða í løtuni við at kanna møguleikarnar fyri at spara enn meira í rakstrinum og optimera framleiðsluna enn meira, soleiðis at vit kunnu bjóða eitt sindur hægri prísir fyri rávøruna og samstundis hava lønsemi í.«

*Noyðast tit ígjøgnum stálbaðið aftur?*

»Ja, tað er sannlíkt; vit noyðast at finna allar hugsandi mátar at rationalisera og ella effektivisera í næstum, so vit kunnu klára eitt nýtt tørn í hesum harðnaða umhvørvi.«

Men O.C. Joensen hava framvegis góðar vónir um framtíðina, segði Hans Jákup Johansen.

»Vit trúgva framvegis upp á hesa vinnuna og seta vónirnar til at nakrar av teimum ytri umstøðunum fara at normalisera seg áðrenn alt ov langt frá líður. Til dømis kunnu virkir í okkara grannalondum ikki í tað óendaliga verða rikin við hjálp av konkursum. Okkara virki er væl optimerað í allar mátar og verður tað kanska enn meira í næstum.«



# Fáa líka nógva inntøku næsta ár

**Feskasta inntøkumetingin hjá fíggjarmálaráðnum vísir, at inntøkan hjá Landskassanum av skatti og avgjøldum fer ikki at fella næsta ár**

FÍGGJARPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár fer landskassin at fáa líka stórar inntøkur av skatti, sum hann fær í ár.

Tað vísir nýggjasta inntøkumetingin hjá Fíggjarmálaráðnum.

Nú seinasta hond verður løgd á fíggjarlógina fyri næsta ár, hevur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fingið eina heilt feska inntøkumeting frá Fíggjarmalaráðnum um búskaparligu útlitini næsta ár.

Metingin vísir, at næsta ár verða landskassans inntøkur av skatti, mvg og øðrum avgjøldum, eins stórar, sum tær eru í dag.

Metingin vísir enntá, at inntøkurnar fara at vera 14 milliónir hægri næsta ár, enn tær eru í ár.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta er bæði gott og ringt.

– Tað góða í hesum er, at vit fáa ikki nakra beinleiðis afturgongd í búskapinum, sum mong annars hava stúrt fyri. Og tað er sjálvsagt at fegnast um, at inntøkurnar hjá landskassanum ikki fara at fella meiri.

– Sostatt vísir metingin, at teir døpru spádómarnir, sum hava verið frammi um føroyska búskapin, fara tíbetur ikki at halda.

Men hinvegin er tað sjálvandi einki serligt, at ongin framgongd er og at búskapurin ikki veksur, men stendur ístað.

Hann sigur, at tá ið metingin vísir, at inntøkan hjá landskassanum stendur í stað, skal tað eisini havast í huga, at lønirnar fara at hækka eini 4% næsta ár.

– Sostatt merkir inntøkumetingin ikki, at arbeiðsloysið ikki fer at veksa. Inntøkumetingin vísir, at lønarhækkingin førir við sær, at tað almenna fer at fáa líka stóra intøku næsta ár, hóast arbeiðsloysið veksur eitt sindur.

Hann sigur, at ein orsøk til, at inntøkurnar ikki fella meiri, er, at fiskivinnan metir, at fiskaprísirnir fara ikki at fella meiri.


*– Vit ætla at føra ein fíggjarpolitikk, sum ger, at tað almenna helst fer at skapa arbeiðið til fleiri hendur næsta ár, enn tað ger í dag, sigur, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

### Høgga ikki bremsurnar í

Tí verður tað framvegis neyðugt at føra ein ógvuliga varnan figgjarpolitikk.

Men landsstýrið ætlar ikki at høgga bremsurnar í fyri at spara.

Aðalráðini hava fingið boð um at spara 10% av ætlaðu lønarútreiðslunum í sjálvari miðfyrisitingini næsta ár.

Hetta er ein sparing uppá sjey milliónir og Bárður Nielsen sigur, at tíverri slepst ikki undan, at nøkur missa starvið.

Tað hevur verið nevnt, at eini 15-20 fólk fara at missa starvið av hesum. Men fíggjarmálaráðharrin væntar, at tey verða heldur færri.

– Nøkur fara av natúrligum orsøkum, antin tí at tey fella fyri eftirlønaraldrinum, ella tí at tey skifta starv, og onnur fara at arbeiða niðursetta tíð.

– Spurningurin er, hvussu langt vit koma við tí. Heilt undan uppsagnum sleppa vit neyvan, men eg vænti ikki, at talan verður um 15-20 uppsagnir, sigur hann.

Afturfyri sparingunum í miðfyrisitingini ætlar landsstýrið at føra ein arbeiðsskapandi fíggjarpolitikk á øðrum økjum.

Tað merkir, at landið fer at gera stórar útbygggingar næstar ár fyri at hjálpa til samfelagshjólini framvegis fara at mala nøkunlunda skjótt, so at afturgongdin skal merkjast so lítið sum gjørligt.

Av tí at fíggjarlógin ikki er liðug enn, vil hann ikki útgreinað tað í smálutir. Men hann sigur, at ætlanin er at seta nógvan pening av til miðnámsskúla og tunnilsgerð í Suðuroy, umframt skal nógv setast av til ábøtur á Landssjúkrahúsinum.

Tað eru serliga hesar tríggjar útbyggingarnar, sum verða raðfestar næsta ár.

Samstundis verður eldraøkið raðfest frammaliga.

– Fleiri sambýli, sum eru í gerð kring landið, verða liðug nú og næsta ár.Og tey eru rættiliga starvsfólkakrevjandi, so har verður brúk fyri fitt av pengum til starvsfólk.

Um tunnil til Viðareiðis er við í fíggjarlógini, vil hann ikki siga nakað um.

– Men samanumtikið ætla vit at føra ein fíggjarpolitikk sum fer at føra við sær, at sum heild fer tað almenna ikki at fáa brúk fyri færri starvsfólkum næsta ár- heldur fer tað almenna at skapaarbeiði til fleiri hendur næsta ár, enn tað ger í dag, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Hvussu fíggjarlógin fyri næsta ár annars sær út, vil hann heldur ikki siga.

Men tað er í hvussu so er greitt, at hon fer at geva hall.

Hann hevur áður sagt, at landstýrið miðjar eftir, at næsta ár skal hallið á fíggjarlógini ikki vera størri enn tað er í ár og tað stendur hann framvegis við. Í ár verður hallið á fíggjarlógini góðar 200 milliónir.

# Uppstillingarfundur í Søldarfirði

**Startskotið til nýggju uppstillingina í Runavíkar kommunu verður í Søldarfirði í kvøld**

UPPSTILLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kvøld verður fyrsti uppstillingarfundur til kommunuvalið í Runavíkar kommunu. Fundurin byrjar klokkan 20 í skúlanum í Søldarfirði, og hesaferð eru tað søld-firðingar og fólk á Skipanesi, sum fara at tosa um, hvat best er at gera, nú kommuval stundar til.

Á fundinum fara tey at viðgera spurningin, um serstakur listi skal gerast í økinum – ella um listi skal gerast saman við øðrum og hvørjum, um so verður.

Við seinasta kommunuval varð listi gjørdur í økinum við níggju valevnum.

Ragnar Olsen varð valdur við 70 atkvøðum, og næstur á listanum var Ólavur A. Olsen, sum fekk 57 atkvøður.

Fundurin í Søldarfirði verður soleiðis startskotið til nýggju uppstillingina í Runavíkar kommunu, sum til valið hesaferð eisini fevnir um Skála, Funnings-fjørð, Elduvík og Oyndarfjørð.

# Fara at ganga og renna fyri góðari heilsu í Suðuroy

**Leygardagin verður skipað fyri gongutúri ímillum Øravík og Vág. Samstundis fer ein bólkur at renna eftir varðagøtunum úr Øravík til Vágs til frama fyri fólkaheilsuna**

GONGUFERÐ OG HEILSURENNING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin verður skipað fyri tveimum stórum tiltøkum í Suðuroy.

Í fyrra lagi verður skipað fyri gonguferð eftir teimum gomlu fjallagøtunum úr Øravík til Vágs.

Men tey heilt villu, sum hava hug at renna hendan sama túrin eftir fjøllunum, eru vælkomin til tað.

Tí samstundis sum tað verður skipað fyri heilsurenning í Havn, skipar ferðavinnan eisini fyri heilsurenning í Suðuroy.

Og heilsurenningin í Suðuroy fer kanska at seta síni heilt serlig krøv til rennararnar, tí ætlanin er nevniliga at renna eftir teimum gomlu fjallagøtunum úr Øravík til Vágs.

Men tey, sum ikki orka at renna allan vegin, kunnu sjálvsagt ganga inn ímillum.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30 til Øravíkar.

Gingið, ella runnið, verður inn til hagaportrið omanfyri Øravík og framvið Tinggilinum Upp millum Stovur har suðuroyingar í gomlum døgum hildu ting.

Landslagið er sermerkt við gilum og hvøssum ryggum. Her er eisini Tingborðið og helst fer onkur at fortelja søgnina um Snæbjørn sum dømdu at arbeiða í bólti og jarn á Bremerholm.

Farið verður um Mannaskarð og ein góðveðursdag er framúr gott útsýni yvir Dalin og Hovs-vøtnini. Vit fara síðani eystanfyri Laganfellið og oman til vøtnini. Millum vøtnini gongur gøtan eftir Vatnarryggi. Umframt at her er nógvur heiðafuglur, so skuldi verðið nógv huldufólk her.

Eystanfyri gøtuna á Vatnaryggi er Ærgidalur. Her er funnin partur av einum ærgi úr víkingaøldini. Tá ið vit koma um Vágsskarð, gongur gøtan so líðani omaneftir, til tú kemur til Hvannadal. Varðarnir ganga oman til Hvanndalsá. Farið verður oman til Vágs vestanfyri viðarlundina.

Eftirsum hetta er seinasti gongutúrurin í ár, verður farið oman á Hotel Bakkan eftir túrin og har fæst ein drekkamunnur og okkurt afturvið til keyps.

Síðani koyrir bussur aftur á Tvøroyri.
Tað kostar 100 krónur fyri vaksin at vera við og tá er bussurin við. Men hjá børnum er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.